

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 08 - 2012

# Risa gasstangakip umvælt á Nólsoyarfirði

Í góða viku hevur risastóra LNG, gasstangakipið Meridian Spirit ligið fyri akkeri á Nólsoyarfirði. Skipið, sum kom úr Fjareysturi, var ávegis til Hammerfest í Norðurnoregi, tá skiparin, vestmenningurin Dánjal Pauli Lisberg, tók avgerð um at leggja inn í Føroyum. Skipið skal ikki vera í Hammerfest eftir nýggjari last fyrr enn 29. august. Tí var ov mikið av avlopstíð og hon kundi einsvæl brúkast til at gera ymsar neyðugar umvælingar, har Mest hevur staðið fyri arbeiðinum, skifta manning og taka inn proviant og aðra vøru í Føroyum. Teknikarar eru eisini komnir úr útlandinum fyri at gera ymisk umvælingararbeiði. Leggja vit alt hetta saman við havnagjaldi og øðrum tænastum, so hevur henda stutta vitjanin givið nakrar krónur í ymsar kassar á landi. Hetta er júst sama skipið, sum var á Nólsoyarfirði fyri eini tíð síðani, tá undir navninum Mærsk Meridian. Tá eins og nú vóru tríggir av manningini føroyingar. Sum oljan.fo skilur hevur Mærsk gjørt av at selja út LNG partin av sínum flota og er hetta tað fyrsta av seks skipum, sum Teekay Corporation hevur keypt frá Mærsk. Skipið er 285 metrar langt og lastar 104.000 tons. Tað siglur fasta rutu við gassi úr Hammerfest (Melkøya/Snøvit) í Norðurnorra og til lond í Fjareysturi, Japan og Malaysia. Vanliga verður siglt gjøgnum Suez veitina men hesaferð gekk leiðin suður um Afrika, tí ætlanin var at fáa eina last á leiðini henda vegin, men tað var so av ongum. Umboð fyri skipið er Faroe Agency. Carl Erik Reynheim sigur við oljan.fo, at tað er altíð hugaligt, tá slík stórt skip leggja leiðina til Føroya, tí tað gevur væl av arbeiði og inntøkum. Hevði talið verið størri, so hevði tað kunnað munað hjá nógvum. Sum skilst ræður eisini um at marknaðaføra Føroyar, tí vit liggja so væl fyri millum Norðurnorra og USA, Europa og Fjareystur. Nógv skipaferðsla er á hesum leiðum og gera fleiri reiðarí eisini meira og meira brúk av Føroyum. Eitt nú koma mong skip á Fuglafjørð at bunkra, sigur Carl Erik. Hvørvítt orsøkin til at

skipið kom til Føroyarat gera umvælingar oa. var tí, at skiparin er føroyingar skal ikki verða sagt her, men tað kann so hava verið ein medvirkandi orsøk. Hetta til umhugsan hjá øðrum føroyskum yvirmonnum eisini, sum sigla á hesum leiðum. Myndir Meridian Spirit á Nólsoyarfirði. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller og Eyðun Waagstein